

Professari Alain Pellet er millum undirvísarnar í SACS. Hann telist millum leiðandi altjóðarættar serfrøðingunum í heiminum

# Dómari úr altjóða dómstólinum í Haag undirvísa á Setrinum

Jan Müller

19.06.2015 - 11:44

Oljan.fo

Skeiðið “Sacs”, 2015 Summer Academy on the Continental Shelf, verður á Fróðskaparsetur Føroya komandi vikuna, har leiðandi altjóðarættar serfrøðingar fara at undirvísa.

Komandi vikuna koma fólk úr nógvum heimsins heraðshornum til Føroya at nema sær vitan og kunnleika um landsgrunsatlit. Talan er um skeiðið “SACS”, sum á øðrum ári verður hildið á Fróðskaparsetrinum. Tilsamans verða umleið 35 luttakarar, ið umboða umleið 20 ymiskar tjóðir, m.a. Suðurafrika, USA, Nigeria, Singapore, Sri Lanka, Bangladesh, Kina og eisini Føroyar.

Millum undirvísararnar er ein dómari úr altjóða dómstólinum í Haag, ein professari frá lærda háskúlanum í París, føroyski limurin í Landgrunsnevnd Sameindu Tjóða, Martin V. Heinesen og tveir starvsfelagar hansara, Dr. Walter Roest úr Fraklandi og Dr. Estevao Stefane Mahanjane úr Mozambique umframt føroysku umboðini í sendinevnd Kongsríkisins viðvíkjandi landgrunsmálum, Dr. Bjørn Kunoy, løgfrøðiligur ráðgevi og sendinevndarleiðari, og Finn Mørk, serkønur jarðfrøðingur. Sostatt verður høvið hjá næmingunum at nema sær vitan frá fremstu serfrøðingunum í heiminum innan teknisk og løgfrøðilig atlit, ið hava at gera við landgrunsrættindi og marknaáseting í landgrunsmálum.

Tað hevði ikki borið til at skipað fyri skeiðinum uttan holla fíggjarliga stuðulin, ið Fróðskaparsetrið hevur fingið frá DONG, Statoil Føroyar og Atlantic Petroleum, umframt frá samstarvsfelaganum Korean Maritime Institute úr Suðurkorea.

SACS verður fyriskipað av Fróðskaparsetur Føroya í samstarvi við Martin V. Heinesen, Finn Mørk og Bjørn Kunoy.

Mynd:

“Professari Alain Pellet er millum undirvísarnar í SACS. Hann telist millum leiðandi altjóðarættar serfrøðingunum í heiminum, og hevur verið ráðgevi og advokatur í nærum øllum millumtjóða trætumálunum, ið hava verið latin til altjóða dómstólin í Haag seinastu 20 árini.”